

Tyrlan hjá Atlantsflogi til arbeiðis á Brugdan 2 leitimiðinum fyrraárið.

# Atlantic Airways sáttmála við Statoil um oljuflúgving

**Jan Müller**

09.01.2014 - 16:48

Oljan.fo

Atlantic Airways hevur gjørt avtalu við Statoil um at taka sær av flúgvingini í sambandi við komandi tvær boringar á føroyska landgrunninum. Hetta skrivar Wall Street Journal fyri løtu síðani. Talan er bæði um tyrluflutningin millum boripall og flogvøllin í Vágum og loftvegis flutning millum flogvøllin í Vágum og Norra.

Sambært blaðnum byrjar boringin í øðrum ársfjórðingi og er ætlað at vara í 5-8 mánaðir. Tyrluflutningurin fer at verða við tyrlu av slagnum AW139, sum verður leigað til uppgávuna.

Samlaði sáttmálin liggur millum 26-41 mió. kr.

Atlantic Airways hevur veitt tænastur til oljuleiting á føroyska landgrunninum síðani 1994 og SAR uppgávur síðani 2001. Síðani 2001 hevur flogfelagið eisini veitt offshore tænastur í føroyskum, bretskum, donskum og hálendskum øki.


THE WALL STREET JOURNAL.

Atlantic Airways wins tender to provide Statoil